## Nýtt eldra-sambýli á Strondum

**Nýtt eldrasambýli verður í næstum bygt á Strondum. Fyrireikingarnar eru komnar heilt væl áleiðis**

KOMMUNU-TÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Strondum:** Eldri strandingar og fólk í Sjóvar Kommunu annars kunnu nú síggja fram til at sleppa at búgva í eldrasambýli á Strondum á ellisárum.

Sjóvar Kommuna er komin væl áleiðis við fyrireikingunum til eldrasambýlið, sum ætlanin er at byggja oman fyri skúlan á Stondum, sigur Tummas Johannesen, tekniskur leiðari hjá Sjóvar Kommunu.

Nýggja eldrasambýlið á Strondum er ætlað at hýsa 10 føstum búfólkum. Umframt verða tvey umlættingarpláss eisini, sigur Tummas Johannesen. Hann veit ikki endaliga prísin enn, sigur hann.

Fyrireikingararbeiðið er komið so mikið langt, at væntast kann, at spakin verður settur í ein av allar fyrstu døgunum, sigur tekniski leiðarin.

Av øðrum kommunalum stórmálum á Strondum nevnir hann kloakkarbeiðið við Sjógv, sum varð liðugt í summar. Annars er ikki nakað stórmál beinleiðis í gongd í løtuni, sigur hann.



*Sjóvar Kommuna fer at byggja egningarskúrar á havnarlagnum beint innan fyri bátahylin á Strondum*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Egningarskúrar á Strondum

**Sjóvar Kommuna letur byggja egningarskúrar millum bátahylin og Langanes**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Strendur:** Sjóvar Kommuna er farin undir at bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum rógva út av Strondum. Teir fáa nú nýggjar egningarskúrar beint innavert bátahylin. Samlaði kostnaðurin fyri egningarskúrarnar er settur til 1,8 millión, tá liðugt er.

Tummas Johannesen, tekniskur leiðari hjá Sjóvar Kommunu, sigur, at arbeiðið er farið í gongd. Tað er smápartafelagið Sandur Danielsen á Strondum, sum skal gera nýggju egningarskúrarnar.

Talan er um níggju skúrar, sum fara at fevna um eina samlaða vídd upp á 286 fermetrar, sigur Tummas Johannesen. Hvør skúrur fer at hava egna frystigoymslu, sigur hann. Ein av skúrunum fer at vera eitt sindur størri enn hinir. Soleiðis hálvaaðru stødd ella so. Har skal wc og talvurúm gerast, sigur tekniski leiðarin hjá Sjóvar Kommunu.

Skúrarnir skulu leigast út til útróðrarmenninar á Strondum. Tað eru fleiri bátar, sum rógva út av Strondum. Teir flestu eru smáir bátar, har ein maður vanliga er við. Um teir ætla at taka seg saman og leiga skúr í felag, ber tað eisini til, sigur hann. Teir, sum fara at brúka skúrarnar, skulu gjalda fyri leigu og elnýtslu.

Tað er eingin fiskamóttøka á Strondum, men tað bilar einki, siga strandingar. Tí stutt er yvir á Toftir, og har plaga teir vanliga at sleppa av við fisk.

# Nýggj vatnveiting á Selatrað

**Sjóvar Kommuna hevur gjørt nýggja vatnveiting á Selatrað. Eisini fær Morskranes nýggja vatnveiting, sum verður liðug fyrsta dagin**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*



*Sjóvar Kommuna hevur lagt nýggja vatnveiting við reinsiverki og goymslubrunni á Selatrað. Tilsvarandi arbeiði er í løtuni í gongd á Morskranesi*

Selatraðfólk hava nú fingið kommunalt vatn. Eisini eru brandpostar settir upp, soleiðis sum krav er um, sigur Tekniski leiðarin hjá Sjóvar Kommunu.

Bygdirnar Selatrað, Morskranes og Kolbeinagjógv hoyra allar til Sjóvar Kommunu. Tískil er tað Sjóvar Kommuna, sum hevur ábyrgdina av, at hesar bygdirnar fáa tær tænastur, teimum tilkemur. Eitt nú reint vatn í nóg stórum nøgdum.

Á Selatrað er tann trupulleikin loystur, sigur Tummas Johannesen, tekiskur leiðari hjá Sjóvar kommunu.

Kommunan hevur lagt vatnleiðng um alla bygdina, har eisini brandlinjan er løgd. Umframt er gjørdur goymslubrunnur og reinsiverk.

Vatnið verður leitt úr keldum gjøgnum reinsiverkið í brunnin, haðani tað so fer út til brúkaran.

Eisini á Morskranesi er Sjóvar Kommuna í ferð við at loysa vatnspurningin. Har verður í løtuni arbeitt við eini líknandi skipan, sigur tekniski leiðain hjá Sjóvar Kommunu.



# Arbeiðsgevarar forða uppstilling

**–Tað er ómetaliga skuffandi, at nøkur arbeiðspláss forða teirra starvsfólkum at stilla upp, tí tað er ein borgarlig skylda at stilla upp, um tað verður heitt á teg, sigur Carl August Arge, ið er formaður í Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag**

SJÁLVSTÝRISLISTIN Í HAVN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*– Tað hevur verið øgiliga ringt at fáa serliga kvinnur á listan hesaferð. Vit høvdu vónað at fáa fleiri yngri kvinnur á listan, men tað eydnaðist tí verri ikki, sigur Carl August Arge formaður í Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag.*

*Mynd: Savnsmynd*

Seinasta fríggjadag kom Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag á mál við uppstillingini til kommunuvalið 9. november. Eins og flestu aðrir flokkar, hevur Sjálvstýrisflokkurin havt trupulleikar við at finna fólk, sum eru sinnað at stilla upp.

– Tað hevur verið øgiliga ringt at fáa serliga kvinnur á listan hesaferð. Vit høvdu vónað at fáa fleiri yngri kvinnur á listan, men tað eydnaðist tí verri ikki, sigur Carl August Arge formaður í Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag.

Hann leggur afturat, at Sjálvstýrisflokkurin hevur havt fleiri fólk, sum upprunaliga høvdu játtað at stilla upp fyri flokkin, men hava verið trýst at takka nei, tí arbeiðsgevari teirra hevur sett seg ímóti.

– Tað er ómetaliga skuffandi, at nøkur arbeiðspláss forða teirra starvsfólkum at stilla upp, tí tað er ein borgarlig skylda at stilla upp, um tað verður heitt á teg. Vit hava hesaferð merkt illvilja frá fleiri arbeiðsgevarum, og tað er ein stak óheppin og ivasom gongd, vísir Carl August Arge á.

### Atkvøðuslúkarar burtur

Sammett við listan hjá Sjálvstýrisflokkinum á seinasta kommunuvali í Havn kann ein leggja til merkis, at atkvøðuslúkararnir hjá flokkinum frá valinum í 2000 ikki stilla hesaferð.

Hvørki Ronald Poulsen ella Ása Olsen, sum fingu ávikavist 121 og 104 atkvøður, eru á listanum Sjálvstýrisflokkinum. Sjálvstýrisflokkurin megnaði ikki at vinna sær ein sess í Tórshavnar býráð á seinasta kommunuvalið, men kortini hevur Carl August Arge góðar vónir undan kommunuvalinum 9. november.

– Vit eru við fyri vinna, sigur Carl August Arge.

*Listin hjá Suðurstreymoyar Sjálvsstýrisfelag:*
Carl August Arge
Ingeborg Godtfred
Jónas Johnson
Noomi Juul
Klæmint Olsen
Tórbjørn Poulsen
Øssur Simonsen
Jóhan Stenberg

## Konjektur-frágreiðingin skal viðgerast í samgonguni

Tað skortar ikki við atfinningum frá Búskaparráðnum til politisku myndugleikarnar í feskastu konjekturfrágreiðingini, sum varð latin almenninginum í farnu viku. Løgmaður Jóannes Eidesgaard hevur lisið konjekturfrágreiðingina, og hann greiðir frá, at atfinningarnar frá Búskaparráðnum verða tiknar upp til politiskt kjak í samgonguni í næstum.

– Tað er nógv mál í frágreiðingini, ið vit eru noyddir at hava eina støðu til, tí stórur partur av frágreiðingini er vendur beinleiðis ímóti politisku skipanini. Búskaparráðið er upprunaliga eitt politiskt produkt, og tí vildi tað verið at skotið okkum í skógvarnar, um vit ikki tóku frágreiðingina upp til politiska viðgerð, sigur Jóannes Eidesgard.

Hann leggur afturat, at frágreiðingin hjá Búskaparráðnum er ikki komin á dagsskrá enn, men samgongan fer at umrøða hana í næstum.

Spurdur, um hann ikki hevur eina persónliga støðu til atfinningarnar í frágreiðingini, svarar løgmaður, at sjálvssagt hevur hann tað, men hann ynskir fyrst at viðgera frágreiðingin saman við sínum starvsfeløgum í samgonguni.

**-páll**

# Rafiksa latið aftur

**Fallandi kundaskari, dýr leiga og nógv ferðing er orsøkin til, at Rafik Bourbiaa hevur gjørt av lata Rafiksa Pizza aftur í Tórsgøtu í Havn**

PIZZARIA LETUR AFTUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*–Eg orki ikki meira, tí tað er langt at ferðast úr Vestmanna hvønn dag. Tað er eisini ómetaliga dýrt at leiga í Havn, og færri og færri kundar vitjaðu, sigur Rafik Bourbiaa, sum fyri sløkum 14 døgum síðan lat Rafiksa Pizza aftur í Havn.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Eitt av mongu matstovunum í høvuðsstaðnum, Rafiksa Pizza, er farið í søguna. Eigarin av Rafiksa Pizza, Rafik Bourbiaa, hevur seinastu góðu tvey árini havt pizzaria í bygningunum í Tórsgøtu 11 í Havn, har Manhatta og Rio Bravo eisini halda til. Fyri sløkum 14 døgum síðan gjørdi Rafik Bourbiaa av lata Rafiksa Pizza aftur.

– Eg orki ikki meira, tí tað er langt at ferðast úr Vestmanna hvønn dag. Tað er eisini ómetaliga dýrt at leiga í Havn, og færri og færri kundar vitjaðu, greiðir Rafik frá.

Rafik Bourbia hevur framvegis eitt pizzaria í Runavík, sum hann ætlar at varðveita. Spurdur um tað er hansara tykki eru ov nógv matstøð í høvuðsstaðnum í løtuni, svarar Rafik, at tað er tað so avgjørt, og hann sigur seg ikki verða bilsnan um fleiri við honum verða noydd at gevast í næstum.

Millum 8 og 9 fólk starvaðust á Rafiksa Pizza

## Ov seinir á sjóarfallinum

– Búskaparráðið átti at sæð sjúkutekini í vinnuni, og tær avleiðingar hetta hevur fyri samfelagið sum heild, í tí frágreiðingini sum kom fyri einum ári síðan. Tað er bara ikki nokk bert at staðfesta eina gongd, sum vit øll vita frammanundan.

Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum verður skrivað, at nýggja konjekturfrágreiðingin hjá Búskaparráðnum kemur ov seint. Vinnuhúsið er av teirri áskoðan, at Búskaparráðið eigur regluliga at taka pulsin av á búskapinum og ávara um afturgongdina, áðrenn hon er her.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað er neyðugt hjá Búskaparráðnum at koma javnan við styttri og meira aktuellum konjekturfrágreiðingum.

**-páll**